# Kunnu noyða foreldrasamveru ígjøgnum



**Tá ið annað foreldrið noktar hinum foreldrinum at síggja teirra felags barn, kann fútarætturin í ringasta føri biðja politiið um hjálp**

BØRN OG FORELDUR
*Randi Jacobsen*
*randi@sosialurin.fo*

Heilt nógv børn búgva ikki hjá báðum foreldrunum, tí antin hava foreldrini ongantíð búð saman, ella tey eru farin frá hvørjum øðrum.

Í allar flestu førum megna foreldrini sjálv at gera avtalu um, nær felags barn teirra skal vera hjá tí foreldrini, um tað ikki býr saman við.

Men so eru tað tey, sum ikki kunnu avtala nakað, og tey hava so møguleikan at fara til Ríkisumboðið, sum út frá samrøðum við partarnar og stundum børnini eisini gera eina samveruresolutión. Tað er ein skrivlig avtala um, nær hitt foreldrið hevur rætt til at vera saman við barninum.

Lene Moyell Johansen, fulltrúi hjá Ríkisumboðnum sigur, at nógv tær flestu av teimum resolutiónum verða hildnar, men viðhvørt gongur ikki.

Hennara fatan er, at flestu avtalubrotini eru fyri tíðina jól og nýggjár.

– Tá ið vit hava gjørt eina samveruresolutión fyri eitt nú jólini og nýggjári, fáa vit ikki gjørt meira. Tí var tað eisini líka mikið, um Ríkisumboðið var stongt ella hevði opið um jólini. Tey fólkini mugu venda sær til fútarættin.

### Kunnu ikki semjast

Tá ið foreldur venda sær til Ríkisumboðið fyri at fáa avtalu um samveru, er tað tí, at tey sjálv ikki eru før fyri at semjast. Undir samtaluni hjá Ríkinum eydnast ofta at fáa tey at semjast, og so gongur alt væl, sigur Lene Moyell Johansen.

Hon sigur, at í teimum førinum, tá ið avtalan ikki verður hildin, heldur hon tað vera rætt, at leggja samverudagarnar soleiðis, at samveran byrjar í góðari fyri jól, áðrenn fútarætturin er farin í jólafrí.

Er avtalan, at foreldrini skulu skiftast um at hava barnið á jólum, og avtalan ikki verður hildin, hevur Ríkisumboðið møguleikan, at hitt foreldrið skal hava barnið tvey jól á ráð.

Tá ið Ríkisumboðið ger samveruresoultiónirnar, verður mett um, hvat tænir barninum best, um tað eru onnur systkin. Er barnið 12 ár, skal barnið hoyrast. Yngri børn kunnu hoyrast.

– Vit lurta eftir øllum pørtum og meta so um, hvat tæn ir barninum best, sigur lene Moyell Johansen.

### Ymiskar orsøkir

Tá ið ein avtala um samveru ikki verður hildin, er munur á, um annað foreldrið er beistaktigt, ella rímilig grund er fyri ikki lata barnið til hitt foreldrið, eitt nú sjúka.

Tað foreldrið, sum hevur verið fyri vanbýti, hevur møguleikan at søkja um erstarningssamveru.

– Eingi slík mál eru eisini. Vit uppliva, at annað foreldrið hevur fingið brnið í samveru og kemur ikki aftur við barninum til ásettu tíð. So eru tað børn, nokta at fara til hitt foreldrið av eini ella aðrari orsøk. Og vit hoyra børn siga, at alt hevði loyst seg, um mamma og babba dugdu at tosa saman, sigur Lene Moyell Johansen.

Hon heldur, at lutfalsliga fleiri mál um samveru hava verið fyri tíðarskeiðið um jólini og nýggjárið.

Tá ið fútarætturin læt upp aftur 28. desember, vendur onkur forsmádd foreldur sær til fútarættin, tí samveruresolutiónin, tey høvdu fingið, varð brotin.

– Tað fyrsta, vit gera, er at kalla partarnar á fund, og tað er oftast við stuttari ávaring, tí búgva bæði foreldrini ikki her, hevur tað skund at fáa loyst trætuna, sigur Peter Flügge, dómarafulltrúi í Føroya rætti.

### Torført at taka støðu

Hann heldur tað stundum vera torført at taka støðu til, hvat best er fyri barnið, men tað hjálpir at kunna tosa við børnini eisini.

Fútarætturin kann áleggja tí foreldrinum, sum ikki vil lata barnið frá sær, bøtur, men eisini ber til at fara harðari fram og biðja politiið um hjálp.

– Tað hendir, at vit gera tað, men tað er eingin serliga góð uppliving fyri barnið. Tá ið vit fara út at tosa foreldrið, hava vit ofta bara avtalu við politiið um at vera til reiðar, um tað gerst neyðugt, sigur Peter Flügge.

– Stóri trupulleikin er, at fólk ikki kunnu semjast og ikki hugsa nógv nógv um barnsins rætt, sigur Peter Flügge.



**SAAB 9.5 2.0 TURBO** 6 mánaða garanti
**Skrásetingarnr:** JT 761 **Km:** 24.000
**Árgangur:** feb. 2008
**Útgjald:** 79.500 **Mðr. gjald:** 4.965 (5 ár)
**kr. 318.000,-**



**HONDA CIVIC 1.6** 6 mánaða garanti
**Skrásetingarnr:** GE 328 **Km:** 76.000
**Árgangur:** juli 2004
**Útgjald:** 22.000 **Mðr. gjald:** 2.200 (3 ár)
**kr. 88.000,-**



**PEUGEOT 307 1.6 STC,** 6 mánaða garanti
**Skrásetingarnr:** FP 505 **Km:** 44.000
**Árgangur:** okt. 2006
**Útgjald:** 36.250 **Mðr. gjald:** 2.289 (5 ár)
**kr. 145.000,-**



**PEUGEOT 407 COUPÉ 3.0** 6 mánaða garanti
**Skrásetingarnr:** BJ 455 **Km:** 42.000
**Árgangur:** juni 2006
**Útgjald:** 62.000 **Mðr. gjald:** 3.874 (5 ár)
**kr. 248.000,-**



**MAZDA PREMACY 1.8** 6 mánaða garanti
**Skrásetingarnr:** RG 751 **Km:** 95.000
**Árgangur:** sept. 2004
**Útgjald:** 24.500 **Mðr. gjald:** 2.434 (3 ár)
**kr. 98.000,-**



**TOYOTA HILUX 4X2 2.5 TD** 6 mánaða garanti
**Skrásetingarnr:** SP 526 **Km:** 23.000
**Árgangur:** aug. 2007
**Útgjald:** 43.750 **Mðr. gjald:** 2.760 (5 ár)
**kr. 175.000,-**



**TOYOTA YARIS 1.3 LUNA M/M** 6 mánaða garanti
**Skrásetingarnr:** GB 420 **Km:** 36.000
**Árgangur:** august 2006
**Útgjald:** 34.000 **Mðr. gjald:** 2.125 (5 ár)
**kr. 136.000,-**



**TOYOTA AVENSIS 1.8 SOL STC.** 6 mánaða garanti
**Skrásetingarnr:** KU 505 **Km:** 75.000
**Árgangur:** juni 2003
**Útgjald:** 37.000 **Mðr. gjald:** 3.634 (3 ár)
**kr. 148 .000,-**



**PEUGEOT 206 2.0 DIESEL VØRUV.** 6 mánaða garanti
**Skrásetingarnr:** JU 505 **Km:** 53.000
**Árgangur:** jan. 2004
**Útgjald:** 22.000 **Mðr. gjald:** 2.179 (3 ár)
**kr. 88.000,-**



**TOYOTA AURIS 1.6 SOL** 6 mánaða garanti
**Skrásetingarnr:** SP 563 **Km:** 28.000
**Árgangur:** des. 2007
**Útgjald:** 49.500 **Mðr. gjald:** 3.071 (5 ár)
**kr. 198.000,-**

**6 mánaða garanti**

**Vit bjóða 6 mánaða garanti uppá bilar, ið kosta meira enn 85.000,-**
Garanti skipan, ið hevur eina sjálvsábyrgd uppá kr. 500,-, fevnir um allar knappliga íkomnar feilir, ið eyðsæð ikki skyldast nýtslu brúkarans, rust, uttanífrákomnir skaðar ella væntandi tænastueftirlit.
Eingin gandur og eingir smáir bókstavir.
**Kom og vitja okkum – landsins fremstu bilasølu.**

Brúktir bilar við **lagaligari fígging**

**REYNI SERVICE** P/F
Vegurin Langi · Hoyvík · Tel 353040 · Fax 353041
Við Borðoyavík · Klaksvík · Tel 473040 · Fax 473041
T-postur: rs@reyniservice.fo · www.reyniservice.fo